Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín D. Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í norðurlandamálum

Evni: Ætlanin hjá landsstýrinum um grøna endurreisn

Spurningar:

1. Hvat meinar landsstýrismaðurin við, tá hann sigur, at vit í Føroyum skulu hava "grøna endurreisn"?
2. Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrið um sokallaða "grøna endurreisn"?

Viðmerkingar:
12. desembur í fjør var grein á heimasíðuni hjá Norðurlandaráðnum viðvíkjandi Vision 2030 hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum, har Kaj Leo Holm Johannesen úttalar seg um ætlanir í Føroyum um eina "grøna endurreisn" (grøn genrejsning) eftir COVID-19.

Virkisætlanin fyri Vision 2030, ið ráðharraráðið hevur gjørt í samstarvi við Norðurlandaráðið, vísir á 12 ítøkilig mál fyri, hvussu Norðurlond verða best integrerøða og mest burðardygga økið í heiminum. M.a. snýr tað seg um politiskar raðfestingar innan ringbúskap, burðardygga framleiðslu og burðardyggar matvøruskipanir. Samstundis er ætlanin, at einstaki norðurlendski borgarin skal hava burðardyggari nýtslu. Í hesum sambandi vísti Kaj Leo Holm Johannesen á, at í Føroyum ætlar landsstýrið at endurbyggja eftir COVID-19 á burðardyggan ella "grønan" hátt.

Áhugavert hevði verið at vitað, hvørjar ætlanirnar eru fyri eina burðardygga endurreisn í Føroyum, og um hetta arbeiðið er farið í gongd, nú Búskaparráðið hevur víst á, at afturgongdin í føroyska búskapinum í sambandi við COVID-19 kann væntast skjótt at verða yvirstaðin, og búskapurin aftur fer at vaksa.

Á Løgtingi, 18. mai 2021

Ingilín D. Strøm